FUGLAFJARÐAR KOMMUNA

# LÝSING EFTIR DAGRØKTARUM

Søkt verður eftir dagrøktarum til kommunalu dagrøktina í Fuglafjarðar kommunu at byrja tann 15. august 2008.

Í dagrøktini í Fuglafirði arbeiða 8 dagrøktarar.

Spælistova er knýtt at dagrøktini. Í dagrøktini ganga 40 børn, í aldrinum 0 – 7 ár.

Ein treyt fyri at søkja starvið er, at dagrøktarheimið skal verða barnavinarligt innrættað, har rúm er til børnini at spæla, og at eitt hóskandi trygt spælióki er uttanfyri.

**Vit vænta at tú:**
- kanst arbeiða sjálvstøðugt
- hevur hug at skapa ein tryggan og mennandi gerandisdag, við virðing og umsorgan fyri tí einstaka barninum.

Lønin verður ásett sambært sáttmála millum Starvsmannafelagið og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya fyri dagrøktarar.

Nærri upplýsningar um størvini fáast við at ringja til Eyðgerð A. Petersen, dagrøktarleiðara á telefon 7377 94, ella sosialdeildarleiðaran á telefon 73 77 56.

Møguligar umsókinir, ið skulu verða skrivligar, skulu verða Fuglafjarðar kommunu, Postboks 30, 530 Fuglafjørður í hendi í seinasta lagi leygardagin tann 14. juni 2008.

Kommunan skilar sær rætt til at velja millum innkomnar umsóknir ella onga at taka.

# Sølufólk/Lærlingur
## til Málingahandilin í Havn

Søgt verður her eftir Sløufólki/lærlingi til Málingahandilin við landavegin í Havn.

Hevur tú hug at selja máling, tapet, persiennur o.a?

So er tað møguliga tær vit leita eftir.

Málingahandilin søkir eftir lærlingi ella sølufólki at byrja skjótast tilberð.

Vit hava selt máling síðan 1962, og ætla at selja máling í nógv ár enn.

Fyrimunur er um tú hevur royndir við máling og koyrikort til persónbil.

Krav til at blíva lærlingur er at tú hevur FHS útbúgving.

Eru spurningar, so eru tygum altíð vælkomin at ringja 313825 og spyrja eftir Helga á Reynatrøð.

Málingahandilin við landavegin. Tlf 313825

LITAVAL P/F

Litaval P/F · Box 1019 · 100 Tórshavn

## Lærarastørv
# í Fuglafjarðar skúla

**Hesi størv verða lýst leys til setanar:**
- **4 lærarar í tíðaravmarkað starv skúlaárið 2008/2009** fyri lærarar í farloyvi, lækkað tímatal og serligan tørv.
- **1 lærari í tíðaravmarkað starv frá 1. sept. og alt skúlaárið 2008/2009** fyri lærara, ið fer frá við eftirløn.

**Søkt verður eftir lærarum, sum**
- undir ábyrgd leiðslunnar og í samstarvi við lærarar skúlans skulu undirvísa og taka lut í dagliga arbeiði skúlans
- duga at samstarva og eru fyrikomandi
- eru fúsir at taka á seg tær uppgávur, sum eru í skúlanum
- eru stundisligir og nærlagdir

**Førleikakrøv:**
Tey, ið verða sett í lærarastørvini, skulu hava læraraútbúgving og linjulestur ella samsvarandi førleika í ávísum lærugreinum

**Lønar- og setanartreytir:**
Lærarastørvini verða sett sum sáttmálasett størv, uttan so, at tann, sum settur verður, er tænastumannasettur lærari frammanundan.

Tímatalið til eitt av tíðaravmarkaðu lærarastørvunum verður ikki endaliga ásett fyrr enn 1. september 2008.

Lærarastørvini verða lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið í lønarflokkunum 18.1-27.4

**Umsóknir**
Umsóknir við c.v. og ljósriti av prógvum og møguligum viðmælum skulu vera skúlastjóranum í hendi **í seinasta lagi mánadagin 16. juni kl. 10.**

Nærri kunning um størvini fæst við at ringja til Súna í Hjøllum, skúlastjóra, á tlf. 737761. Eisini ber til at senda teldupost til skúlastjóran: suni@ffs.fo

## Fuglafjarðar skúli

**Postboks 9 · FO-530 Fuglafjørður · Tlf. 737760**

**Fuglafjarðar skúli** hevur komandi skúlaár umleið 290 næmingar í 16 flokkum, og her koma at starvast 34 fólk. Áhugaði kunnu lesa meira um skúlan á heimasíðuni: www.ffs.fo


HEVUR TÚ EINA GÓÐA SØGU?

Vikuskiftisvaktin hjá SOSIALINUM & PORTALINUM er at hitta alt vikuskiftið á 22 50 00



Ringið um tit hava søgur, hugskot og tips ella um tit vilja kunna um fundir, tiltøk, konsertir o.a., sum fer fram kring alt landið í vikuskiftinum

VIVA


## Sands Skúli
# Lærarar

Lýst verður eftir 2 lærarum til tíðaravmarkað starv skúlaárið 2008/2009 vegna avlopstímar og niðursetta tíð. Annað starvið er fulltíðarstarv og hitt eru avlopstímar.

Endaliga tímatalið verður sett í september.

Í Sands skúla komandi skúlaár verða 55 næmingar og 8 lærarar. Nýggjur skúli er í gerð, sum verður liðugur um árskiftið 2008/09. Skúlin verður bygdur í einari hædd, og har verður rúmligt inni. Skúlin verður ein nýmótans skúli við m.a. ektroniskum talvum.

**Søkt verður eftir lærara sum m.a.:**
- Undir ábyrgd leiðslunar og í samstarvi við lærarir skúlans taka lut í dagliga virksemi skúlans.
- Eru fús at taka á seg tær uppgávur og avbjóðingar, ið eru á skúlanum.
- Eru við til áhaldandi at menna skúlan.
- Duga at samstarva.
- Kunnu átaka sær: ábyrgd av ítrótti, handverk/list, Náttúru/tøkni, enskt, heimstaðarlæru og telduundirvísing. Allar lærugreinar eru hjá 1. – 5. Flokki.

**Førleikakrøv:**
Tey, ið sett verða, skulu helst hava læraraútbúgving.

Starvið verður lønt eftir avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið í lønarflokki 18,1 – 27,4.

**Umsóknir:**
Umsóknir við viðmælum, avrit av prógvum o.ø. skulu vera skúlaleiðaranum í hendi seinasta lagi 18. Juni 2008.

Meira fæst at vita um størvini við at venda sær til skúlaleiðaran, Kristian Højsted, á telefon 361623 ella 252854.

**Sands Skúli**
**210 Sandur**



# Motorsúkkla

Suzuki SV1000, maj 2007, 1400 km, sera væl hildin, til sølu fyri kr. 90.000.

**Ring ella send SMS til 541235**